# Gongutúrur av Víkum til Sørvágs



Sunnudagin 18. juni skipa Vága Kunningarstova og Blue-Gate fyri sigli- og gongutúri av Sørvági norður á Víkar og aftur

Siglt verður av Sørvági við Skarvi sunnumorgunin klokkan 09.00 norður á Víkar, har farið verður upp á land. Staðkendur ferðaleiðari er við, og hann fer at greiða frá um bygdina og ta søgu, ið knýtir seg at henni. Eftir at hava leskað seg við fiskasúpan verður farið til gongu eftir fjøllunum heim til Sørvágs.

Luttakaratalið er avmarkað til 30 fólk, og tekning fer fram á Vága Kunningarstovu tel. 33 34 55. Kostnaður kr. 250,- skal gjaldast frammanundan til Kunningartovuna.

# Kaggin gevur ikki skarvin yvir

Tað er eingin loyna, at tað ikki hevur gingið væl hjá Kagganum seinastu tíðina. Alsamt fleiri dansistøð eru at finna í Havn, og kappingin er sera hørð. Men Kaggin ætlar ikki at geva upp, og fyri kortum vórðu nýggjar ætlanir settar út í kortið á aðalfundinum hjá Kagganum:

– Eg kann ikki avdúka enn hvørjar ætlanir, vit hava fyri framman, men vit geva als ikki skarvin yvir – tvørturímóti. Við fullari megi fara vit at taka kappingina upp við hini dansistøðini, sigur Suni Jacobsen, formaður í Kagganum.

**- horsdal**





**Oslo**

Galdandi frá 27/06 - 15/08-06



**Flúgv og búgv í Oslo**
4 nætur á Radisson SAS Plaza
Fríggjadag - týsdag
Prísur fyri hvønn í dupultkamari. Eyka fyri einakamar kr. 1.540,-. Íroknað prísin er flogferð, gisting, morgunmatur og øll avgjøld
**4.530,-**



**Flúgv og koyr**
B-bilur í 4 dagar
Fríggjadag - týsdag
Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld
**7.602,-**



**Flúgv til Oslo**
Bara flogferð
Íroknað prísin eru øll avgjøld.
(Bilagt á atlantic.fo)
Prísir úr: **2.033,-**

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo



**Starvsfólk til Føroya Banka**




**Starvsfólk til Marknaðardeildina**

Sókt verður eftir starvsfólki til Marknaðardeildina, at byrja skjótast gjørligt.

Við tí endamáli alsamt at styrkja um støðu bankans, lýsa vit eftir einum dugnaligum og fyritaksamum starvsfólki, ið virkin vil luttaka í menningini av okkara vørum og profili, soleiðis at Føroya Banki framhaldandi verður fremsta val føroyinga.

Tú verður partur av einum ágrýtnum marknaðartoymi við tilvísing til leiðaran fyri Marknaðardeildini. Talan er um eitt útvent arbeiði við stórari kontaktflatu, bæði innan- og uttanhýsis, í einum avbjóðandi arbeiðsumhvørvi.

**Arbeiðsøkið**
Yvirskipaði málsetningurin fyri arbeiðsøkið er, at stuðla leiðslum og starvsfólki fyri virkisøkjum bankans í teirra arbeiði við at menna og tryggja virði av vørum og samleika bankans.

**Tínar uppgávur fara m.a. at fevna um:**

- Luttøku í menning og uppfylging av marknaðarátøkum
- Arbeiði viðvíkjandi sniðbroytingum
- Arbeiði við greiningum og frágreiðingum um, hvussu vørur okkara hilnast, og soleiðis geva ískoyti til nýggjar møguleikar fyri vøkstri
- Luttaka í arbeiðinum við stuðuls- og sponsoravtalum

Marknaðardeildn er í løtuni mannað við 4 heiltíðarstørvum.

**Vangamynd**
Vit vænta, at tú hevur kunnleika til marknaðarføring, arbeiðsroyndir, dugir væl at orða teg í skrift og talu, og dugir at halda framløgur. Tú arbeiðir skipað og analytiskt, og megnar at varðveita høvdið kalt tá harðast leikar á. Tú hevur persónliga slagkraft og er ein toymisleikari.

Hevur tú áhuga og kennir teg aftur í lýsingini, so halt teg framat.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal sendast til:
**Føroya Banki, Starvsfólkadeildin,**
**Att. Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-110 Tórshavn.**
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. juni 2006 kl. 16:00.

**Meira kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Edvard Heen, lokal 2134, ella edvard.heen@foroyabanki.fo



FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo